Sólvit E. Nolsø
Súsanna Bertholdsen
Liljan Weihe
Magnus Rasmussen
Bárður á Lakjuni
løgtingsfólk

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 83/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan (Ásetingar um næmingatal í hvørjum flokki)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verður § 20 orðað soleiðis:

"**§ 20.** Næmingatalið í hvørjum flokki eigur við skúlaársbyrjan ikki at vera hægri enn 22. Hetta verður galdandi frá skúlaárinum 2025-26, tá byrjað verður við 1. flokki og síðani endaliga sett í gildi eftir níggju árum.
Stk. 2. Er næmingatalið í einum flokki hægri enn 22, kann skúlaleiðarin í ávísum førum avgera ikki at býta flokkin í tveir flokkar."

Viðmerkingar
Tað kom týðiligt fram undir 2. viðgerð av málinum, at meirilutin og minnilutin í Mentanarnevndini grundleggjandi vildu røkka sama máli við sínum broytingaruppskotum.

Við hesum broytingaruppskoti er roynt at umorða ásetingina á ein hátt, ið týðiligt sigur, hvat hámarkið fyri eini floksstødd eigur at vera, sum tó samstundis letur upp fyri møguleikanum, at lærari og leiðsla á skúlunum kunnu seta inn við eini tvílæraraskipan heldur enn at býta ein flokk í tvey, hóast hann skuldi farið uppum 22 næmingar. Tað verður so í teimum førum, har ein flokkur til dømis er 24 næmingar, men vælvirkandi, óneyðugt at býta hann í tvey einans av teirri orsøk, at næmingatalið er omanfyri 22.

Á Løgtingi, 21. mai 2024

Sólvit E. Nolsø Súsanna Bertholdsen Liljan Weihe

Magnus Rasmussen Bárður á Lakjuni